gult cyan magenta svart

Í geglið fyri blaðmannasøkina

John Vidal vildi hava fatur á føroysku sjónarmiðunum um grindadráp. Tí valdi hann at fara ólógliga í land, hóast hann visti, at hann fór at enda í geglinum

John Vidal angrar, at hann breyt lógina. Men kortini metir hann at avgerðin var neyðug fyri at hann kundi gera journalistiska arbeiðið til fulnar Mynd: Jens K. Vang

JOHN JOHANNESSEN

– Eg eri sloppin út aftur í geglinum.

Hetta vóru fyrstu orðini, bretski blaðmaðurin segði, tá hann seinnapartin mánadagin fekk fatur á redaktiónini í London.

John Vidal, sum er umhvørvisblaðstjóri á stóra bretska blaðnum, The Guardian, kom til Føroya við skipinum hjá Paul Watson, Ocean Warrior, tíðliga fríggjamorgunin.

Bretski blaðmaðurin helt tað vera eitt gott hugskot at koma til Føroya við sama skipi, sum Watson. Hetta, helt hann, fór at geva sær góðan møguleika at skilja sjónarmiðini hjá Watson og hinum fólkunum umborð.

John Vidal grunaði aldri, at føroysku myndugleikarnir fóru at sýta honum at koma í land í Føroyum.

Í tvístøðu

Tá løgreglan hevði givið John Vidal forboð fyri at koma í land í Føroyum, tí hann ikki hevði altjóða pressukort, fór hann at hugsa um at fara í land kortini. Men hann visti, at hetta fór at fáa avleiðingar.

Mánakvøldið gjørdi John Vidal av at fara í land. Manning frá Ocean Warrior sigldi hann inn á Vestmanna við einum skjóttgangandi gummibáti um midnáttarleitið.

– Eg hevði ongan møguleika at tosa við føroyingar. Eg vildi dekka báðar síður av søguni, og tí breyt eg lógina. Og eg helt hetta vera skilagott undir teimum umstøðunum, eg var í. Síðani kundi eg bara vóna, at føroysku myndugleikarnir fóru at skilja mína støðu, sigur John Vidal.

Bretski blaðmaðurin vísir á, at hann var í tvístøðu í hesum sambandi. Støða hansara sum journalistur var, at hann mátti fáa fatur á báðum síðum av søguni. Men hinvegin var støða hansara sum borgari tann, at hann breyt lógina.

– Hetta var trupult, og eg angri, at eg breyt lógina. Men tað var neyðugt júst í hesum málinum, sigur John Vidal.

Tikin beinan vegin

John Vidal ætlaði sær at fáa einar fýra tímar til at tosa við so nógvar føroyingar, sum gjørligt, áðrenn hann sjálvur fór at geva seg yvir til løgregluna og møguliga fór at verða sendur av landinum alt fyri eitt.

Men hetta eydnaðist tó ikki. John Vidal fekk bert prátað við myndamannin hjá Sosialinum, ið var fyrsti maðurin á staðnum og koyrdi runt við honum fyri at finna eitt stað at búgva.

Tá tað var greitt, at fult var á La Careta og Vidal noyddist at fara til Havnar at sova, stóð løgreglan fyri honum og handtók hann.

Hetta er bretski blaðmaðurin tó als ikki argur um. Hann visti, at hann var komin ólógliga inn í landi, og tí ætlaði hann sær eisini heilt vist at melda seg sjálvan.

– Afturlítandi var tað heila mín egna skuld. Eg skuldi verið flogin til Føroya og síðani farin umborð á bátin. Men eg grunaði ikki, at eg ikki fór at fáa loyvi at koma í land av bátinum hjá Watson, sigur John Videl.

Eg hevði míni røttu motiv. Men eg hevði ikki rætta kortið. Tað var ein trupulleiki fyri myndugleikarnar. Men eg viðri myndugleikarnar, sigur hann.

John Vidal sigur, at hann ikki visti, at Paul Watson er roknaður sum brotsmaður í Føroyum.

Hjálptur av starvsfeløgum

Áðrenn John Vidal fór til Føroya við Ocean Warrior, setti hann seg í samband við starvsfelaga sín á Sosialinum, Jan Müller, fyri at fáa at vita, hvønn hann skuldi tosa við í Føroyum um grindadráp.

Eisini beyð John Vidal sær at skriva fyri Sosialin um herferðina hjá Watson.

Av tí at talan var um ein blaðmann, ið skuldi koma til Føroya saman við Paul Watson og øðrum limum í Sea Shepherd, valdi blaðstjórin á Sosialinum at spyrja seg fyri um mannin hjá The Guardian, har hann segði seg arbeiða.

Svarið frá bretska blaðnum var, at talan var um ein ógvuliga virdan journalist, ið tríggjar ferðir hevur vunnið umhvørvisvirðisløn fyri journalistar. Harafturat fekk Sosialurin at vita, at hann eisini einaferð er valdur til ársins journalist í Bretlandi.

Tí metti blaðstjórin á Sosialinum tað vera rætt at hjálpa John Vidal, tá hann ringdi og segði, at løgreglan hevði sýtt honum at koma í land í Føroyum, tí hann ikki hevði rætta pressukortið.

Men tað eydnaðist tó ikki, at hjálpa blaðmanninum lógliga í land.

Tí fór John Vidal av sínum eintingum ólógliga í land og varð handtikin.

John Vidal setti seg aftur í samband við Sosialin úr geglinum, og aftur tá royndi blaðstjórin á Sosialinum at hjálpa honum. Men ikki hjálpti, fyrr enn løgreglan sjálv setti seg í samband við blaðstjóran á Sosialinum og spurdi seg fyri um mannin.

Endin varð, at bretski blaðmaðurin varð leyslatin seinnapartin týsdagin.

Góð nátt í geglinum

John Vidal er ógvuliga væl nøgdur um vitjanina í arrestini í Havn. Hann greiðir frá, at meðan løgreglan avhoyrdi hann meginpartin av týsnáttini, nýtti hann høvið til at spyrja løgregluna ymiskt um grindadráp.

Á henda hátt heldur John Vidal, at báðir partar fingu nakað burturúr náttini.

– Eg royndi at tosa við so nógvar løgreglumenn, sum møguligt. Eg vildi jú hava fleiri sjónarmið fram, og eg visti ikki, um eg fekk høvi at tosa við nakran annan, áðrenn eg varð vístur av landinum, greiðir Vidal frá.

Bretski blaðmaðurin heldur, at løgreglumenninir vóru ógvuliga áhugaverdir at práta við, og hann fekk nógv burturúr prátinum við teir. Hann sat uppi og prátaði við løgreglumenninar heilt til klokkan hálvgum fimm týsmorgunin.

Meginpartin av týsdegnum nýtti John Vidal til at práta við ymsu fangarnar um grindadráp. Hetta helt hann vera sera áhugavert og gott fyri søgu sína.

– Eg tosaði bæði við tjóvar og fólk, sum hava selt rúsevni, og tað helt eg vera sera áhugavert. Besti journalistikkurin er, tá tú ert noyddur at vága eitt sindur, sigur John Vidal.

Avstað í dag

Síðani mikumorgunin hevur John Vidal prátað við politikkarar, embætisfólk og vísindafólk um grindadráp.

Millum annað hevur hann tosað við Pál Veihe, sum fleiri ferðir hevurført fram, at grindin skjótt er so dálkað av grannum okkara, at hon ikki longur er etandi. Hetta heldur John Vidal vera eitt sera áhugavert sjónarmið.

Bretski blaðmaðurin fer aftur til London í dag, og væntandi verður tilfar hansara um grindadráp í Føroyum prentað einaferð í komandi viku.

Blaðstjórarnir báðir, John Vidal og Jan Müller, júst komnir út av politistøðini, har John Vidal hevur sitið í varðhaldi Mynd: Jens K. Vang



John Vidal fekk bókina, sum Óli P hevur gjørt um grindadráp, frá Jan Müller beint eftir, at hann var leyslatin
Mynd: Jens K. Vang

gult cyan magenta svart

USA vi›urkennir føroyska kyksilvurkanning

Mánadagin gó›kendi ein amerikanskur vísindastovnur føroysku kyksilvurkanningina sum vísindaligt prógv fyri, at kyksilvurmarki› fyri mat og umhvørvi› skal lækkast

DIA MIDJORD

Kyksilvurkanningin, har gó›ar túsund føroyskar mammur luttóku, er nú vi›urkend úti í heimi. Amerikanska kongressin almannakunngjørdi mánadagin eina frágrei›ing um kyksilvur, i› vísindastovnurin – National Academy of Sciences – hevur lati› gjørt.

Í frágrei›ingini stendur, at lága nøgdin, i› tilrátt ver›ur amerikufólki at eta, kann vísindaliga prógvast. Og her ver›ur so føroyska kyksilvurkanningin brúkt sum grundarlag.

Tilrá›ingin sigur, at amerikanarar kunnu eta 0,1 mikrogram av kyksilvur um dagin fyri hvørt kilo persónurin vigar. Vit kunnu leggja aftrat, at hetta fyri ein mi›al amerikanara í mesta lagi er ein tvíflís vi› tunfiskasalati um vikuna.

Kostar milliardir

Tá tilrá›ingin um lágu nøgdirnar kom fyri sløkum tveimum árum sí›an, fekk hetta amerikanska ídna›in at gera bart. Tí tilrá›ingin førir vi› sær, at n‡ggj vir›i mugu ásetast, hvussu nógv eitt nú kann latast úr skorsteinum á kolf‡rdum elverkum, og somulei›is mugu n‡ggj vir›i ásetast, hvussu nógv er rá›iligt at eta av tunfiski.

Mett ver›ur, at gó›kennir amerikanska kongressin at lækka kyksilvurmarki›, kemur hetta at kosta samfelagnum einar 100 milliardir krónur.

Leggjast til grund

Í frágrei›ingini ver›ur skoti› upp, at føroyska kanningin ver›ur brúkt sum grundarlag í framtí›ararbei›num móti dálking. Kanningin ver›ur róst sum eitt gott vísindaligt arbei›i, har nógv fólk eru kanna› á ymsan hátt.

Nevndin í National Academy of Sciences, sum hevur kanna› vi›urskiftini, sigur seg eisini vera stak væl nøgda vi› framløguna, i› yvirlæknin Pál Weihe og doktarin Philippe Grandjean høvdu í USA í 1998.

Ta› var eftir fyrispurningi frá umsitingini hjá Al Gore, at teir bá›ir vóru í USA. Vísindanevndin sigur, at hon í framløguni fekk nøktandi svar upp á allar sínar ivaspurningar.

Kyksilvurkanningin, har gó›ar túsund føroyskar mammur luttóku, er nú vi›urkend úti í heimi. Pál Weihe yvirlækni á deildini fyri Arbei›s- og Almannaheilsu var eitt av umbo›unum í nevndini, i› gjørdi kanningina

Funni› maskintelegraf og kúgveyga

Á middegi í gjár komu fyrstu lutirnir upp av jólaskipinum, og harvi› er dreymurin vor›in veruleiki, sigur Heri Andreassen, sum hevur samskipa› kavingina í Fugloyafir›i

EDVARD JOENSEN/- EIRIKUR LINDENSKOV

Kl 12:05 í gjár kom fyrsti luturin av Jólaskipinum upp til vatnskorpuna. Talan var um ein maskintelegraf, og vi› hesum var dreymurin hjá Hera Andreassen og hinum, i› nú hava gjørt fleiri royndir at fáa eitthvørt upp av Jólaskipinum, veruleiki.

Hóast lutirnir hava ligi› á havsins botni í nærum 60 ár, so sást væl, hvørjar lutir, talan var um.

Kavararnir á nærum 100 metra d‡pi klára ikki at taka lutirnar upp vi› sær, men í sta›in settu teir flot á teir og pumpa›u luft í. Uppi á yvirflatuni vóru so menn í gummibátum, sum savna›u saman lutirnar.

Talan er um fimm lutir: Tveir maskintelegrafar av brúnni, annar vi› fóti, og hann er helst av messingi. Eitt kúgveyga, sum ikki er verri fari› enn at ta› kann latast upp og aftur. Sí›ani er funnin ein fótur afturat vi› onkrari rullu. Umframt lutirnar, i› teir høvdu fingi› upp, tá bla›i› var› greitt til prentingar, frættu vit, at teir eisini høvdu lokalisera› skipsklokkuna. Tá vóru kavararnir ikki uppafturkomnir, og greitt var ikki, um teir møguliga høvdu klokkuna upp vi› sær.

Fer›in upp til vatnskorpuna tekur um hálvan annan tíma.

Men hava teir ikki klokkuna vi› sær, ver›ur roynt aftur í morgin, skilja vit á lagnum úr Fuglaoyafir›i.

Heri Andreassen sigur vi› Sosialin, at teir fyribils eru rættuliga væl nøgdir.

Kavararnir høvdu 18 minuttir á botni at arbei›a í. Fyrsti luturin kom upp kl 12:05, og tann sí›sti luturin var á dekkinum á Dragabergi fyri klokkan hálvgum eitt.

Naka› av dramatikki var, tá fyrsti luturin kom upp. Men vóru ikki rættuliga klárir – men teir fingu tó lutin til høldar, á›renn hann tók at søkka.

Líkindini í dag at kava vóru hampulig. Onkur gla›a var at síggja, men lagi er sera gott.

Leahy senatorur tekur undir vi› frágrei›ingini

Demokraturin Patrick Leahy, talsma›ur í kyksilvurmálinum, krevur nú, at politisk tiltøk ver›a sett í verk

DIA MIDJORD

Frágrei›ingin, i› var› almannakunngjørd mánadagin, hevur fingi› senatorin Patrick Leahy, i› er demokratur, at taka til or›a. Hann er talsma›ur í umhvørvismálum og krevur nú, at politisk tiltøk ver›a sett í verk.

– There are no more excuses, stendur í skrivinum frá skrivstovuni hjá Patrick Leahy.

– Vit mugu ste›ga dálkingini av kyksilvuri og verja heilsuna hjá amerikumanninum. Í fleiri ár hevur kongressin saman vi› serligum áhugabólkum sparka› bóltin frá sær, men frágrei›ingin frá vísindastovninum sta›festir, at vit nú eru komnir til málstrikuna. Kongressin má nú taka eina avger›, i› gagnar fólkinum og halda uppat vi› at renna ørindi fyri ymsar áhugabólkar, sigur Patrick Leahy í sínum skrivi.